TAKS



# TAKS sóknast eftir einum løgfrøðingi

## Arbeiðið á TAKS er grundað á lóg og løgfrøði, og nú er starv tókt til ein løgfrøðing á Lógadeildini hjá TAKS.

**Fakligu avbjóðingarnar** til løgfrøðingarnar á TAKS eru nógvar og ymiskar, og møguleikarnir fyri menning innan eitt løgfrøðisliga samansett øki eru góðir.

**Uppgávurnar hjá løgfrøðingunum eru m.a.:**

- At ráðgeva og stuðla málsviðgerunum hjá TAKS í løgfrøðiligum spurningum og eftirlitsarbeiði.
- At luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.
- At gera ummælir í kæru- og dómsmálum.
- At leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum.

Løgfrøðingarnir leggja í stóran mun teirra arbeiði til rættis sjálvir, men eru eisini partar av ymiskum toymum, bæði við aðrar løgfrøðingar og onnur fakfólk á TAKS.

Á Lógadeildini á TAKS starvast fimm fólk, harav trý eru løgfrøðingar. Bygnaðurin fyri Lógadeildina er undir endurskoðan, og tí má umsøkjarin tola møguligar broytingar.

**Umsøkjarar til starvið** skulu hava útbúgving sum løgfrøðingur (cand.jur.). Viðkomandi starvsroyndir eru ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Tann, ið søkir, skal:**

- Hava góð evni at samstarva.
- Hava hug og hegni at samskifta og vegleiða nógvum ymiskum fólkum.
- Vera fyrikomandi.
- Vera arbeiðssamur/som og nærlagdur/løgd.

**Starvið verður lønt** sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Setanarøkið er TAKS**, men fevnir eisini um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Starvið verður sett** skjótast møguligt.

**Meira fæst at vita** um starvið, við at venda sær til Jákup Eyðfinn Kjærbo, leiðara á Lógadeildini, á telefon 352600 ella telduposti jek@taks.fo

**Send umsókn**, lívsrensl v.m. til taks@taks.fo, merkt: løgfrøðingur, í seinasta lagi 4. september 2014, kl. 12.00.

www.taks.fo